Fíggjarnevndin

Viðmerkingar viðvíkjandi útboðstilgongd

Kann útboðið av Outsystems-menningini (konsulentrammuavtala við menningartímum) bjóðast út av nýggjum?

- Stutta svarið er ja. Verandi avtala kann uppsigast við 3 mánað freist.

Hvørjar kunnu avleiðingarnar verða við at bjóða út av nýggjum?

- Verkætlanin er í gongd, og høvuðsveitarin, sum vann upprunaligu útbjóðingina, hevur gjørt íløgur í KT-mennarar, sum nú hava góða serfrøði til júst hetta (Outsystems). Tí koyrir menningin nú, sum hon skal. Tað kann hava stóra ávirkan á framgongdina av samlaða programminum, um mennararnir (starvsfólkini) verða útskift. Ein møgulig útskifting viðførur lægri produktivitet og framgongd. Avleiðingin av tí vil so alt annað líka verða, at samlaða verkætlanin tekur longri tíð og gerst dýrari.
- Í upprunaliga útboðnum fyri 3 árum síðani, har allir veitarar høvdu møguleika at luttaka, vóru tað bert 4 veitarar, sum vóru áhugaðir og bjóðaðu uppá uppgávuna, harav bert ein (útlendskur) veitari hevði ítøkiligar førleikar í Outsystems. TAKS vitandi, hvur eingin føroyskur KT-veitari síðani ítøkiliga arbeitt við at menna hesar førleikar, uttan tann veitarin, sum var bíligast og vann útboðið. Eitt nýtt útboð má sjálvandi eisini taka hædd fyri góðsku, sum upprunaliga útboðið eisini tók hædd fyri, tvs. førleikum hjá Outsystems-mennarunum, sum veitararnir hava at bjóða. Tískil kann neyvan roknast við, at eitt nýtt útboð broytir nakað stórvegis, uttan so, at onkur vil dumpa prísin og/ella brúka útlendska arbeiðsmegi, ella kann hetta eisini føra til "headhunting" av starvsfólkum hjá hvør øðrum við hesum serligu førleikum. Hetta kann møguliga skapa spjaðing í KT-vinnuni.
- TAKS hevur í løtuni góðar tímaprísir til Outsystems-menningina. Eitt nýtt útboð kann í sjálvum sær gera, at prísirnir hækka. Júst tímaprísurin hevur stóra ávirkan á samlaða kostnaðin av verkætlanini.
- Veitingartrygd. Hesi 3 árini TAKS hevur arbeitt við verkætlanini, er tað blivið meira og meira greitt, at veitingartrygd er sera týdningarmikil. Tað merkir, at veitarin skal hava ávísa stødd og kunna veita arbeiðsmegi, trygd og støðugt, við røttum førleikum.

Skálatrøð 20
Postrúm 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
taks@taks.fo
www.taks.fo

- KT-trygd. Verðin hevur broytt seg nógv seinastu árini, og KT-trygd fyllir meira og meira. Tað er tí samstundis eisini nakað, sum má takast enn størri atlit til í einum møguligum nýggjum útboði. TAKS kunnugt, eru bert tveir veitarar í Føroyum, sum eru KT-trygdargóðkendir við uttanhýsis grannskoðan eftir ISO-standardi.
- Sum skilst, so skapar tað nakað av órógv, at onkur følir, at upprunaliga útboðið ikki er farið fram á rættan hátt. Hinvegin kann eisini hugsast, at teir veitarar, sum vístu upprunaliga útboðnum áhuga, og serliga tann, sum vann útboðið, kann koma at standa í einari keðiligari støðu í mun til sína íløgu í just hetta.
- Ikki minst er tað vert at hava í huga, at talan er eisini um menniskju, sum hava lagt sína arbeiðsleið til rættis eftir just hesum, og sum kunnu verða meint rakt av einari møguligari útskifting.

TAKS hevur áður gjørt vart við, at upprunaliga útboðsmannagongdin var røtt og rættvís, og mæla staðiliga frá, at verkætlanin skal bjóðast út av nýggjum. Umframt omanfyri nevndu grundgevingar verður eisini talan um eitt stórt fall í produktiviteti og framgongd hjá teimum, sum eru partur av programminum, tí øll TAKS-organisatiónin verður sett í eina bíðistøðu. Stovnurin er nú í gongd, og er klárur at seta fulla ferð á, saman við teimum menningartoymum, sum eru mannaði og eru í gongd.

Vinarliga,
TAKS

Eyðun Mørkøre, stjóri

Skálatrøð 20
Postrúm 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
taks@taks.fo
www.taks.fo